## Soleiðis verður spælt í Bosnia

**Keypmannahavn:** Í bólki 2 eru saman við Føroyum Ongland, Albania og Georgia, og verður spælt dag um dag móti londum um í nevndu raðfylgju. Fyrsti dysturin er móti Onglandi mikudagin.

Í bólki 1 eru londini Bosnia, Cypros, Estland og Armenia. Tey bæði bestu londini í hvørjum bólki spæla hálvfinalur og síðani finalu ella bronsudyst. Eisini verður spælt um lægri plaseringarnar, og eru øll liðini tí vís í at fáa fimm dystir í kappingini.



## 15.000 krónur fyri yvirvekt

Keypmannahavn: Tá ið føroyska hondbóltsferðalagið kekkaði inn í Kastrup fyrrapartin í dag, máttu tey ásanna, at øll eru ikki so lagalig, sum Atlantsflog er. Hondbóltssambandið hevur nógv klæði og útgerð við sær til kappingina í Bosnia, og neyðugt var at gjalda 15.000 krónur fyri yvirvekt á ferðini frá Kastrup til Sarajevo. Tey 150 kiloini, sum vóru ov nógv, hevði Atlantsflog tó flogið ókeypis til Danmarkar.

# Fríða væntar gott úrslit

**Fríða Marjunardóttir heldur, at landsliðsferðin í Bosnia skal nýtast sum eitt gott og virðiligt punktum á kappingarárinum. Føroysku spælararnir hava vant hart í Danmark og eru væl fyri til dystirnar í Challange Trophy**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Fríða Marjunardóttir staðfestir, at hópurin er sera væl fyri, og farið verður beina leið eftir gullinum í Challenge-Trophy kappingini*

**Keypmannahavn:** Sum partur av liðnum hjá VÍF, sum í ár flutti niður úr Sunset-deildini, hevur hondbóltsárið hjá Fríðu Marjunardóttir ikki verið akkurát tað, sum hon hevði vónir um.

Nú farið verður til Bosnia er hon eisini skjót at staðfesta, at júst ein slík ferð hevur verið við til at hildið huginum til hondbóltin uppi.

– Árið gjørdist jú slettis ikki so, sum vit høvdu vónað. Vit endaðu í niðara bólkinum, og tá tað so eisini gjørdist til niðurflyting, sigur tað seg sjálvt, at lagið fer nakað niður. Men júst í slíkum førum er ein túrur sum hesin ein sera góð gularót at miða eftir, og tí gleði eg meg eisini til at enda árið væl, sigur hon.

### Styrkt á venjingarleguni

Undan ferðini til Bosnia, hevur landsliðshópurin verið í Danmark í nakrar dagar á venjingarlegu. Ein venjingarlega, sum Fríða heldur hevur gagnað liðnum sera væl.

– Vit hava vant rættiliga hart, og tað er í sjálvum sær í fínasta lagi. Men hartil, so gevur ein slík lega eisini eitt betri samanhald millum spælararnar, sum nú kenna hvørja aðrar nógv betur. Og við at spæla nakrar venjingardystir, hava vit eisini kunnað roynt nøkur ting.

Og hvussu heldur tú so sjálv, at liðið er fyri?

– Vit eru væl fyri. Dystirnir hava gingið rættiliga væl, hóast hesir í ávísan mun eru nýttir at eksperimentera í. Og eg ivist ikki í, at vit fara at standa okkum væl í kappingini.

Eins væl, sum liðið gjørdi tað fyri tveimum árum síðani?

– Tað er so í øllum førum ætlanin. Og helst enn betri, staðfestir Fríða at enda.

## Flúgva tvær ferðir í dag

**Týsdagurin verður at kalla allur sum hann er nýttur til ferðing hjá landsliðshópinum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

**Keypmannahavn:** Tær sóu fyri tað mesta frískar og væl upplagdar út, tá tær komu við bussi til flogvøllin í Kastrup.

Føroyska kvinnulandsliðið í hondbólti legði í dag leiðina úr danska høvuðsstaðnum – har tær hava verið á venjingarlegu – og til Bosnia. Flogið verður umvegis Wien í Eysturríki, og tí verður talan um ein hampuliga drúgvan dag hjá hópinum.

Sum heild eru spælararnir væl fyri. Onkur ferðir av krími ger nakað um seg, men sum skilst, so er hetta tó ikki verri enn ilt. Og í øllum førum er tað ikki so, at nøkur teirra er seingjarliggjandi.

Umframt spælararnar sjálvar, telur landsliðshópurin eisini venjararnar báðar, Flemming Raben og Svein Rógva Nielsen. Ferðaleiðarar eru Niels Petur Bech, Eirikur Magnussen og Jákup Durhuus. Hartil er danska Tina Jacobsen við sum fysioterapeutur.



GITIÐ LEIKARAN

**Kappingarreglur**

Frá mánadegnum 3. apríl og í 15 fylgjandi Sosialum verður andliti á einum kendum føroyskum fótbóltsspælara at síggja. Myndin er tó viðgjørd nakað, soleiðis at tað verður truplari at vita, hvør spælarin er.

Á síðu 31 í fótbóltsblaðnum, sum var partur av VikuskiftisSosialinum, eru 15 tómar reglur. Á hesar skulu nøvnini á teimum 15 spælarunum setast.

Tá hetta er gjørt, skal blaðsíðan við nøvnunum sendast okkum. Seinasta freist fyri innlatan er mánadagin 1. mai. Navnið á vinnaranum verður kunngjørt í Sosialinum tann 4. mai.

Minnist til at skriva navn, bústað og telefonnummar á seðilin, sum verður sendir okkum.

Verður avrit av síðuni sent okkum, verður hetta ikki roknað sum gyldugt luttøkuprógv.



Vinnið fótbóltsupplivingina Skotland - Førpyar

ATLANTIC AIRWAYS